Reportasjurøð - Lívið á Landssjúkrahúsinum

# Ikki bara bl



**SJÚKRAFLUTNINGUR. Rani í Líð, Petur av Kák og Niels Danielsen eru høvuðsleikarar í hesi mynd av portørstarvinum á Landssjúkrahúsinum. Vit hava tikið úr rúgvuni av upplivingum, vit høvdu saman við teimum eina tólv tíma langa vakt. Lesið um sjúkraflutning við ketogandoyvdum sandoyingi, stríð móti óskynsomum loysnum og eitt ísakalt og angandi andlát**

## Reportasja



**Høgni Mohr**
Rithøvundur
post@sosialurin.fo

- Blóðtrýstið er ókey! Hann hevur fingið Primperan, Voltaren og injektión av Ketogani frá læknanum!

Klokkan er trý korter til ellivu ein vanligan fyrrapart. Vit eru á veg av Gomlurætt til Havnar. Í ljósabláari skjúrtu við stuttum ermum situr 42 ára gamli Petur av Kák og viðger sjúklingin á børuni. Tríogtretivu ára gamli Rani í Líð, sum koyrir sjúkrabilin, er í hvítari t-troyggju. Boðini frá kommunulæknanum eru, at sjúklingurin, sum er sandoyingur um seksti ára aldur, hevur gallstein. Ella kanska hjartatrupulleikar. Hann hevur ógvuliga ilt og fær ilt gjøgnum Hudson-masku. Petur av Kák heldur fram at kunna vakthavandi í Havn í telefonini:

- Læknin visti ikki, um tað møguliga var gallsteinur. Men hann helt ikki, at tað var hjartað. Maðurin hevur einki tikið fyri hjartað. Blóðtrýstið var 152 yvir 85 klokkan 10.36. Vit máta blóðtrýstið aftur nú. Hann saturerar 100, og pulsurin er 53. Her stendur returkoyring 1 í journalinum, men vit koyra kotu 2. So tað er í fínasta ordan. Ókey, bei!

Sjúklingurin er róligur, hóast hann enn fær ringar ríðir við pínu. Tá ið herðindini eru harðast, trívur hann við høgru hond í eitt handtak uppi undir loftinum og lyftir seg uppfrá. Hann spennir, so hvør spong spílast. Men komin á Velbastaðarháls fjara líðingarnar so líðandi av. Júst sum Rani hyggur í speglið, spitar upp og fer fúkandi fram við einum bili, yvirhálar Ketoganið pínsluna hjá tí sjúka. Petur mátar blóðtrýstið. Tað er í lagi. Ketogankáti sjúklingurin fer at tosa um gamlar dagar, tá ið Tórshavn Radio og Reyði Krossur vóru álitið. Petur smírist heldur hveppin, men leggur enn dent á at halda øllum ótta burturi.

- Tú hevur havt herðindi av pínu, ha? Eg síggi, at læknin segði, at tað kundi vera gallsteinur, og at tað neyvan var hjartað. Tað er gott! Koma herðindini í høgru síðu?

- Ja, svarar sjúklingurin og leggur so afturat, nøgdur sum bara ein maður við uppgangandi kenning kann vera:

- Nei, tað var ikki lív við Reyða Krossi!

Petur tekur kjansin og smekkar heitasta politiska evnið á børnuna: Sandoyartunnilin!

- Hvat heldur tú; skulu vit hava handa tunnilin?

Men sandoyingurin á børuni tekur øll á bóli. Hann avdúkar, at hann ikki torir at siga, at hann er rættiliga væl nøgdur við Teistan! Flent verður hjartaliga, og soleiðis gjørdi eitt leystligt prát um fast samband høvuðsorsøkin til, at langi túrurin tóktist munandi styttri. Tí nú eru vit brádliga beint við bráðmóttøkuna í G-bygninginum.

Petur loysir blóðtrýstmátaran av arminum, beint áðrenn vit bakka inn móti hurðini. Hann hevur eisini loyst iltslanguna frá, tá ið Rani togar børuna út. Vit rulla mannin inn á skaðastovu 1, har ið læknin tekur um endan.

Sosialurin